**Getsemane, á Brekku 19 Klaksvík**
Leygardagin kl. 10 er morgunbøn. Onki møti og ongin sunnudagsskúli er sunnudagin vegna Páskastevnu í Kelduni.

**Kfum og Kfuk Klaksvík**
Skírishósdag kl.18.00 Israelsk máltið.
Langafríggjadag kl. 18 møti við Hanus Simonsen.
1. Páskadag kl.18 møti við KBBB, ongin sunnudagsskúli.
2. Páskadag kl. 18 møti við Hjørleif Poulsen.
Kl. 21 ungdómsmøti.

**Vælkomin til páskastevnu í Dali**
Skírisdag kl. 18 Sverri Kass talar og Óli Poulsen syngur.
Langafríggjadag kl. 18 Sverri Kass talar og Óli Poulsen syngur.
Páskaaftan kl. 18 Niels Jacob Nielsen, talar og sangkreftir av Sandi.
Páskadag kl. 18 Niels Jacob Nielsen, talar og sangkreftir av Sandi.
2. páskadag kl. 18 Streingjakórið av Argjum hevur møti.
Páskaaftan og 2. páskadag er innsavnan til arbeiði.
Øll eru vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Mánadag – hósdag kl. 17 hava vit barnamøtir. Øll eru vælkomin!
Skírisdag kl. 19 og Langafríggjadag kl. 11 og kl. 18 verða evangelisk møtir við luttøku frá hornorkestrinum og øðrum úr Frelsunarherinum í Havn. Eisini fáa vit vitjan av Kristian Nygaard, ið er lærari á Fólkaháskúla Frelsunarhersins í Norra. Um viðrar verða útifundir.
www.frelsunarherurin.fo

**Bethel, Vágur**
Skírishósdag kl. 18 Evangeliskt møti.
Langa Fríggjadag kl. 18 Evangeliskt møti.
Páskadag kl. 11 Breyðbróting
Ongin sunnudagsskúli.
Onki møti kl. 18 vegna møtir í Skúlahøllini í Hvalba.
2. Páskadag onki møti vegna møtir í Skúlahøllini í Hvalba.

**Kristiligir fundir í DK**
Fríggjakvøldið 13. apríl kl. 19.30 verður kristiligur fundur í Mølleparken, Spangbergs Møllevej 16, Esbjerg.
Leygarkvøldið 14. apríl kl. 19 kristiligur fundur í Skolehjemmet. Sønderlandevej 28, Sønderborg.
Sunnukvøldið 15. apríl kl. 17 kristiligur fundur í Staldgårdsgade 4, Vejle.
Talarar: Levi Joensen og aðrir. Eftir fundirnar bjóða vit ein góðan drekkamunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Felagið Tórshavn**
2. Páskadag kl. 15 Rulla páskaregg í Kúrdali.

**Sjómansheimið Ørkin Brautarholt 29, Reykjavík**
Hvønn sunnudag kl. 17 og fram til mai 2007 er møti á Ørkini.

**Veit okkum eina hjálpandi hond**
at seta ein grønmetis ídnað á stovn, millum tey fátæku í Rumenien.
**Ring 905699.** Kostnaðurin er kr. 100 + vanligt uppringingargjald. Kundar hjá Kall kunnu ringja. Takk fyri tína hjálpandi hond.
*Calarasi missiónin v/ Thomas J. Askham, Asbjørn Niclasen og Sverri Kjærbæk.*

**Heilafelagið**
Skrivstovan er opin hvønn mikudag frá kl. 19-20.
*MBF-húsið kjallarin Inngongd frá Landavegnum Tlf. 321520.*

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00
Teldup.: tilhald@torshavn.fo
***Mikudagin 4. apríl***
kl. 10-13.30 ***Ongin matgerð áðrenn páskir***
kl. 10-12 Tóvirkið. (Veving, maskinbinding, seyming, binding o.a. Øll eru hjartaliga vælkomin. ***Ása, Katrin, Margit og Marita***
kl. 14-17 Onki telduprát
kl. 15 ***»Likamsrørsla er av alstórum týdningi fyri at betra um fólkaheilsuna« (AHR). Njóti hetta saman við okkum. Vit ganga. Møti stundisliga. Vitja minnisvarðar frá Kongaminnið til Debesartrøð.*** Randi/Elisabeth, fysioterapeutar
***Hósdagin 5. apríl***
***Skírhósdagur***
***Fríggjadagin 30. mars***
***Langi fríggjadagur.*** Vit ynskja øllum eini gleðiligar páskir.
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Landsfelag Pensjónista**
Felagið heldur til í Tróndargøtu 13, Tórshavn. Skrivstovan er opin hvønn týsdag frá kl. 13.00-16.00. Tlf. 319394 ella 219394.
LP@email.fo

**Dagtilhaldið í Gøtubrá, Gøtu tlf. 441662**
Opið týsdag kl. 15-18.
***Týsdagin 10. apríl***
kl. 15-15.30 Fimleikur við Kristiannu Ennigarð.
kl. 16 Erling Isholm greiðir frá og vísir myndir frá Føroyingahavnini í Grønlandi.
Bussur koyrir úr Syðrugøtu kl. 14.45. Ring Andrias tlf. 505220. Øll eldri eru vælkomin.

**Tilhaldið á Toftum**
*Tlf. 448690*
*Vit halda til í niðaru hædd á Vesturskin.*
*Teldupost: tilhaldnes@post.fo*
Opið er týsdag, mikudag og hósdag. Frá kl. 15.00 – 18.00
*Vit hava hvønn dag ein góðan drekkamunn, eins og vit hava nógv spøl, og annað ítriv.*
*Vit ynskja at øll kenna seg væl og hugnað sær.*

**Dagtilhaldið Vesturskin**
***Opið er týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00.***
***Týsdag*** - fimleikur
***Mikudag*** - Sangløta.
***Hósdag*** - ymist ítriv.
*Allar dagar er møguleiki at lesa bløðini og fáa sær ein góðan drekkamunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.*

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
er opið týsdag til hósdag, kl. 15-18.
***Týsdag*** ymisk spøl.
***Mikudag*** ítriv v/ Rigmor.
***Hósdag*** fimleikur v/ Áshild.
Øll eldri eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvi**
*í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum tlf. 448279.*
*Allir pensionistar hjartaliga vælkomnir.*
*Opið mánadag til fríggjadag kl. 15.00 – 18.00.*
***Skrá vika 14***
***Mánadagur 2. apríl.***
Fimleikur / Styrkivenjingar. Felagssangur.
***Týsdagur 3.apríl.***
Opið hús.
***Mikudagur 4.apríl.***
Opið hús.
***Páskaferia. Vit byrja aftur týsdagin 10. apríl. Gleðiligar páskir.***
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Ver vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag kl 14 –17. Báðar dagarnar er drekkamunnur at fáa. Eisini eru bløðini til taks.
***Tilhaldið Hugnin er stongt mánadagin 2. apríl og mikudagin 4. apríl í páskavikuni. Vit hittast aftur mikudagin eftir páskir, við spennandi tiltøkum.***

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum.**
Dagtilhaldið er opið hvønn týsdag og hósdag frá kl.15-18.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Opið er:
Mánadag og mikudag kl. 13.30-17.30.
Týsdag og Hósdag kl. 9.30-17.30
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
***Mánadag***
Tilmeldan til døgurða týsdag áðrenn kl 17.00 á tlf. 459091
***Týsdag***
kl. 9.30 Gongutúrur
kl. 11.00 bløðini verða lisin fyri sjónveikum
kl 12.00 Døgurði
***Mikudag***
kl. 13.30 Telda
***Hósdag***
kl. 10.00 fimleikur
kl. 11.00 telda
kl. 13.30 bløðini verða lisin fyri sjónveik
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Eldrafelagið Nón**
Í vetur koma vit saman til handaligt arbeiði hvønn týsdag frá kl. 15.00 til 18.00.

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Sandoyar Kunningarstova**
*210 Sandur · tlf. 361836*
Skrivstovan er opin mánadag, týsdag, hósdag og fríggjadag kl. 11-13 og mikudag kl. 14-15.30. www.visitsandoy.fo

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**Spælistovan í Margarinufabrikkini**
Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri børnum/foreldrum uttan ansing.

# Brúðarmyndir



*Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið vóru við til at gera hjúnabandsdag okkara tann 11.11.2006 so minnisríkan og góðan. Gleðiligar páskir øll somul.*
***Sóleyð og Jens Albert***



*Vit vilja hjartaliga takka tykkum øllum, sum gleddu okkum á hjúnabandsdegnum 25. mars 2006. Takk fyri gávur og heilsanir, somuleiðis stóra tøkk fyri ta góðu hjálp, ið okkum varð veitt.*



*Til øll tykkum sum gleddu okkum á diamantbrúdleypsdegnum 15/2-07 við gávum, heilsanum, telefonuppringing, telegrammum og á annan hátt, takka vit hjartaliga.*
***Heilsan Lydia og Petur Larsen, Porkeri***

**50 ár**
17. apríl fyllur Harry Benjaminsen, Toftir, 50 ár. Dagurin verður hildin á Svangaskarði 20. apríl kl. 19. Tey, við vilja gleða meg við at koma í føðingardag vinarliga sigið frá á tlf. 448139 ella 218139 áðrenn 15. apríl.

**Brúdleyp**
Pálmasunnudag 1. apríl *giftust* Katrin Nolsoe og Johannes Joensen í salinum hjá Jehova Vitnum í Hirtshals. Eftir vígsluna var samkoma fyri innbodnum.

Leygardagin 7. apríl giftast Guðrun Joensen av Argjum og Finnur Hansson, úr Hafnafirði. Vígslan verður í Hebron á Argjum kl. 15.00. Dagurin verður hildin fyri innbodnum á Hotel Føroyum.

Leygardagin 14. apríl kl. 15 giftast í Sørvágs kirkju, Oddbjørg Niclasen, Sørvágur og Jógvan Magnussen, Miðvágur. Opið hús verður heima á Traðarvegi 11 kl 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 19. mai kl. 15.00 giftast í Fríðrikskirkjuni Susan Janusardóttir og Øssur Hansen, Toftir. Veitslan verður á Svangaskarði kl. 19. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at tekna seg á tlf. 449131 ella 501381 áðrenn 20. apríl.

**Silvurbrúdleyp**
Páskaaftan 7. apríl hava Anna og Magnus Skýlindal silvurbrúdleyp, tey ið ynskja at gleða okkum henda dagin, eru vælkomin í heimið millum kl. 12 og 18.

Týsdagin 24. apríl hava hjúnini Katrin & Markus Tummas Jacobsen, Klaksvík, silvurbrúdleyp, opið hús verður frá kl. 18.00 í heiminum á Gravarbø.

Týsdagin 8. mai 2007 hava Torlakkur og Jonna Hansen, Nólsoy, verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 12. mai í bygdarhúsinum í Nólsoy, frá kl. 19. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at tekna seg á tlf. 327111 ella 227111 áðrenn 20. apríl.





Mánadagin 11. juni 2007 hava Gunnvør og Petur Thomsen, Madumsøvej 4, Hellum, 920 Skørping silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 23. juni kl. 18. í Veddum forsamlingshus. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu tekna seg áðrenn 1. mai 2007 á tlf. 0045 98398339.